KRINGVARP FØROYA

# Fíggjar- og umsitingarleiðari

Fíggjar- og umsitingarleiðarin í Kringvarpi Føroya hevur avgjørt at royna nýggjar avbjóðingar, og tí verður starvið lýst leyst at søkja.

## Starvið

Sum fíggjar- og umsitingarleiðari stendur tú á odda fyri umsitingini hjá kringvarpinum. Tíggju fólk starvast á deildini, sum hevur ábyrgdina av bókhaldi og fíggjarstýring, avgreiðsluni, innkrevjing av kringvarpsgjaldi, umsiting av spølum, lýsingum og øðrum inntøkugevandi virksemi, starvsfólkamálum og sáttmálum um rættindi v.m. Fíggjar- og umsitingarleiðarin er skrivari í leiðslubólkinum.

## Tínir førleikar

Vit søkja eftir einum leiðara, sum hevur relevanta útbúgving og hóskandi royndir innan umsiting. Vit leggja dent á, at viðkomandi dugir væl at leiða og at skapa eldhuga hjá starvsfólkinum gjøgnum góð samstarvsevni, at fylgja settum málum og støðugt at taka við nýggjum avbjóðingum. Somuleiðis verður dentur lagdur á góð evnir at orða seg munnliga og skrivliga.

## Nærri upplýsingar

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jógvan Jespersen, stjóra.

## Vit kunnu bjóða

Eitt avbjóðandi og spennandi starv, sum gevur tær møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Kringvarpið er framvegis undir uppbygging og menning eftir samanlegging av útvarpi og sjónvarpi, og eisini komandi tíðin verður merkt av broytingum.

## Setanartreytir

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

## Umsóknir

Umsóknir skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi 22. januar 2007.

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur Postboks 1299 FO-110 Tórshavn Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01 www.kringvarp.fo

REPROZ



Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

# TRÝ STØRV Á HAGSTOVU FØROYA

### *Størvini*

Á Hagstovuni hava vit tørv á trimum fólkum at hjálpa okkum við búskaparhagtølum og tjóðarroknskapi.

Uppgávurnar fevna bæði um verandi uppgerð av tjóðarroknskapinum og nýggjar verkætlanir.

- at betra um góðskuna á tjóðarroknskapinum
- arbeiði við skjótum uppgerðum av bruttotjóðarúrtøkuni
- arbeiði við uppgerð av búskaparvøkstri

Við búskaparhagtølum arbeiða í løtuni fimm fólk, sum í samstarvi við KT deildina menna uppgerðirnar av tjóðarroknskapi, almennari nýtslu, húsarhaldsnýtslu, brúkaraprístali, uttanlandshandli, gjaldsjavna og fleiri øðrum áhugaverdum evnum.

### *Førleikar*

Vit seta tær onga formliga treyt um útbúgving, men gera kortini vart við, at vit hava tørv á vællærdum og dugnaligum fólki.

- Akademisk útbúgving í búskaparfrøði ella aðrari samfelagsfrøði er ein fyrimunur.
- Góð evni til KT er eisini fyrimunur.

Vit rokna við, at meginparturin av fyrsta árinum fer til at læra um stovnin, um hagtøl og um nýggju uppgávurnar, sum í stóran mun eru nýggjar fyri bæði teg og okkum.

### *Umsókn*

Lønin er sambært galdandi sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. februar og kann bæði sendast sum teldupostur og vanligt postbræv.

Vilt tú hava meira at vita um størvini og møguleikarnar, ring so á Hagstovuna 352800 og bið um at tosa við John Jacobsen ella Hermann Oskarsson.

TEAMBS

HAGSTOVA FØROYA

GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR

TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO